**Úrskurður Ítróttardómstólsins**

**viðvíkjandi kæru frá Hondbóltsfelagnum Neistanum um úrskurðin hjá dómsnevnd HSFs frá 24. mars 2006**

Á fundi 25 mars 2006 viðgjørdi Ítróttardómstólurin kæru, dagfesta 25. mars 2006, frá Neistanum um úrskurðin hjá Dómsnevndini hjá HSF um at leikbanna Nicolettu R. Hansen í 3 dystir.

Í viðgerðini hava 3 nevndarlimir luttikið: Anja Hovgaard, formaður, Poul Hansen og Børge B. Hansen. Eftir umrøðu mettu allir limir seg verða gegnigar at viðgera kæruna.

**Kæran**
Neistin hevur kært úrskurðin hjá Dómsnevndini hjá HSF frá 24. mars 2006 um at Nicoletta R. Hansen varð leikbannað í 3 dystir.

**Grundarlagið undir viðgerðini**
Grundarlagið undir viðgerðini av kæruni er tilfarið, ið kærarin hevur latið Ítróttardómstólinum t.e.

1. Kæruskriv, dagfest 25. mars 2006
2. Úrskurður frá Dómsnevndini hjá HSF, dagfestur 24. mars 2006.
3. Kæruskriv til HSF frá Stjørnuni, dagfest 20. mars 2006
4. Skriv frá Neistanum til Dómsnevndina, dagfest 24. mars 2006
5. Úrskurður frá kappingarnevndini hjá HSF, dagfestur 22. mars 2006

Kæran varð við telefaksið tann 25. mars 2006 send Stjørnuni til viðmerkingar. Men felagið hevði onki at leggja afturat málinum.

**Viðgerðin hjá Ítróttardómstólinum**

Í stuttum snýr málið seg um, at í dystinum millum 1. kvinnuliðini hjá Neistanum og Stjørnuni tann 19.mars 2006 slær neistaleikarin Nicoletta R.Hansen stjørnuleikaran Báru S. Klakkstein. Dómararnir síggja ikki hendingina og taka tí ikki støðu

Eftir at sjónvarpið í 3-2 sendingini mánakvøldið 20.mars 2006 vístu sjónbandaupptøku av hendingini, kærdi Stjørnan málið til Kappingarnevndina HSFs.

Kappingarnevndin vísti kæruna frá sær við hesum grundgevingum grundað á, at HSF hevur ikki nakrar reglur um at nýta videoupptøkur frá dystum. Í ivamálum verður hugt eftir IHF-reglum, har sagt verður, at videoupptøkur ikki kunnu nýtast í mótmælisviðgerðum. Kappingarnevndin vísti eisini á, at líknandi tilburðir hava verið, har Kappingarnevndin víst málið frá sær við somu grundgevingum.

Stjørnan kærdi hesa avgerð til Dómsnevndina, sum broytti avgerðina hjá Kappingarnevndini við m.a. tí grundgeving, at tað má krevja eina greiða heimild, um Kappingarnevndin og Dómsnevndin hjá Hondbóltssambandi Føroya skulu vera forðaðar í at grunda avgerðir á millum annað sjónbandaupptøkur. Tá tílík heimild hvørki var at finna í reglunum hjá IHF ella reglunum hjá HSF, metti Dómsnevndin seg kunna grunda avgerðir sínar á millum annað sjónbandaupptøkur.

Dómsnevndin avger síðani, at Nicoletta R. Hansen fær leikbann í 3 dystir. Avgerðin fær gildið beinanvegin.

**Úrskurður Ítróttardómstólsins:**
Sambært viðtøkunum hjá HSF er einki nevnt um sjónbandaupptøkur. Í grein 2 stk. 4, 2.pkt er ásett, at Hondbóltssambandið hevur ábyrgdina av, at hondbóltsreglurnar eru í neyvum samsvari við galdandi altjóða reglurnar (IHF). Í dómsnevndarúrskurðinum verður sagt, at IHF ikki sjálvt nýtir videoupptøkur í málum av hesum slagi, men at tað er upp til einstøku limasambondini at taka avgerð um hetta.

Staðfestast má, at tað er einki forboð í reglum HSF's at nýta sjónbandaupptøkur í slíkum málum, men at siðvenja hevur higartil verið ikki at nýta sjónbandaupptøkur og at hvørki nevnd ella aðalfundur hjá HSF hava tikið støðu til spurningin.

Dómstólurin metir, at avgerðin um at brúka sjónbandaupptøku í slíkum málum er so principiellur, at hon kann ikki setast í gildi í viðgerð av einari einstakari kæru.

**Ítróttardómstólurin er tí samdur um, at avgerðin hjá Dómsnevndini, sum einans byggir á sjónbandaupptøku, verður ógildað. Leikbannið hjá Nicolettu R. Hansen verður sett úr gildi beinanvegin.**

Tórshavn 25. mars 2006

Anja Hovgaard, formaður    Poul Hansen, nevndarlimur    Børge B. Hansen, nevndarlimur